# - TÚ ERT B



**PIPAR&SALT** Esmar Eysturoy staðfesti í gjár fyri síni elskaðu Guðrun, at hon er betri enn einki. Tað sama haldi eg um brúdleypið hjá Esmari og Guðrun. Tað var betri enn einki. Rættiliga nógv betri

Rógvi Nybo

Tá Pipar & Salt fyri 12 árum síðani fyrstu fer varð varpað út í hvørja stovu í Føroyum, mundi fáur varnast við, at tey vóru vitni til ein glantrileik, sum eisini fór at vera fólkaogn í 2010.

Í gjárkvøldið vóru 1000 fólk vitni til eitt stórt show í Høllini á Nabb, sum vísti, at tólv ár eldri er Pipar & Salt enn feskt í minninum, sprelllivandi og at fleiri av stuttligu persónligheitunum, sum hava sæð dagsins ljós millum ár og dag, enn klára at fáa smílibondini at arbeiða.

Annan páskadag 2010 staðfesti Esmar Eysturoy fyri síni elskaðu Guðrun, sum hann hevur kallað bæði eitt og annað ljótt, at – Tú ert betri enn einki.

### Stórar vónir

Brúdleypið hjá Esmar Eysturoy og Guðrun má sigast at vera ein stórur blandaður posi av bommi.

Tá tú fert til eina Pipar & Salt framførslu, er tað ikki frítt, at tú væntar tær nógv.

Gjøgnum ár og dag hava vit møtt fleiri nýggjum persónligheitum, og hava fingið fleiri landaplágur sendar út. Og fyri ikki at tosa um tær 22 útseldu sýningarnar í Norðurlandahúsinum í 2005, sum eru farnar í søguna sum legendariskar. Hetta ávirkar sjálvandi, hvat tú væntar tær, tá tú fert til eitt show sum hetta. Hetta leggur eisini stórt trýst á teir báðar Sjúrð og Jákup at levera.

### Ótrúlig evnir

Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe eiga rós uppiborið fyri ótrúliga stór skapanarevni.

At tveir manns í einari og samari sketsj kunnu spæla ótrúligar 24 fullkomiliga ymiskar og originalar leiklutir, er einki minni enn eitt bragd. Hetta sigur heldur ikki so lítið um hvørji evni hesir báðir hava á pallinum.

Saman við góðum tónleikarum sum Showmenn og Finnur Hansen, umframt tær báðar Maluna Eyðunsdóttir og Maluna Thomsen, talar alt fyri kvaliteti, longu áðrenn farið verður á pall.

So er stóri spurningurin bert, um teir kláraðu at levera vøruna í gjár, ella um endaligi dómurin skal vera tann sami um showið, sum hjá Esmari um Guðrun – at tú ert betri enn einki.

## 24 YMISKIR LEIKLUTIR

Gjøgnum brúdleypið hjá Esmar og Guðrun, spæla Jákup Veyhe og Sjúrður Skaale heilar 25 ymsar leiklutir, sum vit kenna aftur úr gomlum Pipar&Salt sendingum, Eg Elski Förjar og øðrum.

### Javnt stuttligt

Brúdleypið hjá Esmar Eysturoy og Guðrun varar í 100 minuttir. Eg kann róliga viðganga, at eg ongantíð hesar 100 minuttirnar á nakran hátt keddi meg. Tvørturímóti.

Hvør leiklutur er somikið stutt á pallinum, at tú nær ikki at keðast av honum, áðrenn brádliga ein nýggjur stendur frammanfyri tær. Skiftið millum teir nógvu leiklutirnar gongur við teirri rúkandi ferð, og sjáldan varði nakar steðgur longri enn gott 20 sekund.

Frá byrjan til enda á brúdleypinum siti eg javnan og smáflenni. Ongantíð sleppur áskoðarin at fella heilt niður á gólv. Hinvegin haldi eg at nógvu og gomlu sangirnir taka broddin úr tí skemtiliga. Eg kom ongantíð hartil, at eg var um at eg eri um at brotna, sum eg onkuntíð fyrr havi verið, tá eg havi hugt eftir Pipar&Salt.

Hinvegin skal eg siga, at eg legði merki til at fleiri av fólkunum rundanum meg ta einu løtuna høvdu ilt við at anda, sum tey flentu. Men fyri meg virkaði tað ikki heilt. Fyri meg var tað javnt stuttligt, men uttan nakr- antíð at koma heilt upp á toppin.

**» At tveir mans kunnu spæla 24 fullkomiliga ymiskar leiklutir er einki minni enn eitt bragd**